# Dúgvuberg sigldi á land

**Fríggjamorgunin fekk alarmsentralurin fráboðan um, at línubáturin Dúgvuberg hevði siglt á land**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Um hálvgum átta tíðina fríggjamorgunin kom um, at línubáturin Dúgvuberg hevði siglt á land. Hol kom á skipið, men teir fingu tó siglt inn á Fuglafjørð kortini, sum teir ikki vóru staddir so langt frá.

Sløkkiliðið í Fuglafirði stóð fyri teimum, tá teir komu.

Seinnapartin kom vaktarskipið Tjaldrið á Fuglafjørð og sleipaði Dúgvuberg til Klaksvíkar, har hann fót beint á beding.



*Tjaldrið sleipaði Dúgvuberg inn á Klaksvík úr Fuglafirði eftir, at skipið hevði rent á land fríggjamorgunin*

*Mynd: Bárður Lydersen*

# Maður druknaður í Klaksvík

**Ein vanlukka í Klaksvík seinnapartin sunnudagin kravdi eitt mannalív. Menn í vóru í ferð við at flyta stállínuskipið Helenu, tá vanlukkan hendi**

VANLUKKA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Ein 49 ára gamal maður druknaði í Klaksvík sunnudagin. Maðurin sigldi við línuskipinum Helenu, sum lá við kei á Kósini, har teir júst høvdu tikið ís. Skiparin gav boð um, at báturin skuldi flytast nakrar metrar longur norður á keiina, so aðrir bátar kundu sleppa framat at taka ís.

Maðurin stóð á keiini og skuldi loysa. Brádliga varnast skiparin, at maðurin hongur í lúnningini. Ógreitt er, hvat hendi, men mangt bendir á, at maðurin hevur roynt at lopið umborð og hevur so ikki megnað tað.

Skiparin fer so manninum til hjálpar, men tað eydnast honum ikki at fáa mannin upp um lúnningina. So sigur maðurin sjálvur, at hann sleppur, tí hann orkar ikki at halda meira og ætlar at svimja inn til keiina. Hvat síðani hendi, er ikki greitt. Tí tað næsta sum hendir er, at ein maður, sum stendur á keiini, sær mannin flóta lívleysan í sjónum.

– Tað er eitt hol har, sum vit ikki vita, hvat er hent. Men tað var sera kalt í veðrinum hendan dagin, so tað kann vera, at hjartað er steðgað, sigur vakthavandi á løgreglustøðini í Klaksvík.




# Ferðsluóhapp millum Fjarða

**Ein bilur við trimum fólkum fór út av vegnum millum Fjarða sunnumorgunin. Ongin fólkaskaði hendi**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Um hálvgum fýra tíðina sunnumorgunin fekk løgreglan í Eysturoynni fráboðanina um óhappið. Ein bilurin við trimum fólkum í fór út av vegnum millum Fjarða. Men ongin teirra kom til skaða. Tey sótu øll í trygdarbelti. Vakthavandi sigur, at bilurin var farin ordiliga útav, og hann lá á liðini, tá løgreglan kom á staðið. Sum sagt fekk ongin av fólkunum skaða.

### Rusk

Vakthavandi sigur, at løgreglan hevur fingið eina fráboðan frá ruskplássinum í Runavík.

Tað er nevniliga so, at tá ruskplássið er stongt, so lata fólk viðhvørt ruskið standa uttanfyri. Og so mugu ruskmenninir bera tað inn, tá plássið letur upp. Tað hava teir fingið nóg mikið av nú og hava meldað ein, sum teir vita, hevur sett rusk uttanfyri til løgregluna.

– Hetta gera teir helst í vón um, at fólk fer at nýta upplatingartíðirnar, og tí at tað óruddar so illa, at fólk lata teirra rusk standa uttan fyri ruskplássið, sigur vakthavandi á løgreglustøðini í Runavík.

# 27 rútar brotnir

**Løgreglan í høvuðsstaðnum sigur frá, at vikuskiftið hevur verið friðarligt, men onkrir tilburðir hava tó verið**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Leygarnáttina um trítíðina fekk løgreglan eina fráboðan um herverk úti á Reyni. 27 rútar vóru brotnir á Skráseting Føroya. Løgreglan veit, hvør hevur framt herverkið, men ongin er tikin enn.

Um fimmtíðina kom so ein fráboðan um harðskap. Tveir menn vóru farnir til hendurs í miðbýnum. Annar maðurin fekk eitt blátt eyga og okkurt smáskursl. Hann bleiv fluttur á skaðastovuna, og løgreglan tók hin mannin.

Sunnumorgunin kom ein fráboðan um herverk á Platform. Nakrar hurðar vóru brotnar. Løgreglan kom á staðið og tók menninar.

# Bátur á land við Morskranes

Bert smávegis materiellur skaði hendi, tá glastrevjabáturin "Vampan" av Strondum fór á land sunnan fyri Morskranes í trúkkum mjørka hósmorgunin. Sjóbjargingarstøðin fekk fráboðan frá politistøðini og vórðu boð alt fyri eitt send víðari til Kollafjarðar Bjargingarfelag, sum fekk alibátin Njørður frá Vestlaks, at koma "Vampanum" til hjálpar. Tað eydnaðist Njørði at toga Vampan av aftur og nakað av skaða var komið á róðrið og kjølin men báturin lat ikki. Vampan varð sleipaður inn á Strendur. Hetta er aðru ferð í ár, at Kollafjarðar Bjargingarfelag bjargar báti á Tangafirði sigur MRCC støðin í Havn í skrivi. Vampan hevði 3000 pund á dekkinum tá óhappið hendi.



# Haldið dampinum uppi

**Landsbanki Føroya sigur í frágreiðing um føroyska búskapinum, at samfelagshjólini mala ikki eins skjótt longur. Seinastu árini hevur stóri spurningurin verið, hvussu stóri búskaparvøksturin skuldi tálmast, men veruleikin er ein annar í dag. Nú ræður um at halda dampinum uppi, og royna av øllum alvi at varðveita núverandi búskaparvøkstur í føroyska samfelagnum**

BÚSKAPARFRÁGREIÐING
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Samfelagshjólini mala seinni enn tey hava gjørt leingi. Komandi árini verður stóra uppgávan at halda dampinum uppi, og varðveita núverandi búskaparvøkstur*

*Mynd: Savnsmynd*

Landsbanki Føroya hevur júst latið árligu frágreiðingina um búskaparstøðuna í Føroyum úr hondum. Frágreiðingin er serliga ætlað útlendingum, ið ein ella annan hátt sýna føroyska samfelagnum áhuga. Á Landsbankanum siga tey, at frágreiðingin er ein lýsing av núverandi búskaparstøðu í Føroyum, og ger vart við, hvørjar avbjóðingar er fyri framman.

Í niðurstøðuni kemur landsbankin fram til, at samfelagshjólini mala ikki eins skjótt longur, tey hava gjørt. Útlitini fyri føroyska búskapinum eru blandað. Óttin fyri einum ovurhitaðum føroyskum búskapi er við at vera heilt burtur. Væntandi fer gjaldsjavnin framhaldandi at vera positivur, tí bæði forbrúk og íløgur í føroyska samfelagnum fara í næstum at lækka.

Tað verður truplari hjá landsins leiðslu at varðveita yvirskot á fíggjarlógini komandi árini. Minkingin í blokkstuðuli úr Danmark hava havt við sær, at inntøkurnar er minkaðar nógv. Kreppan í alivinnuni gera støðuna ilt verri.

### Betri brynjað

Frágreiðingin mælir samgonguni til at fáa størri tamarhald á almennu útreiðslunum. Framvegis er stórt virksemi í føroyska samfelagnum, og tí er nærmast krav til politiska myndugleikan, at yvirskotið á fíggjarlógini verður varðveitt.

Niðurgongdin í føroyska samfelagnum kann als ikki sammetast við stóru kreppuna í nítiárunum. Føroyska samfelagið er í dag væl betur brynja til eina búskaparliga niðurgongd nú, enn í kreppuárunum.

### Trýst á bankunum

Versnandi útlitini í føroyska búskapinum rakar eisini føroyska fíggjarheimin. Seinnu árini hava bæði Føroya Banki og Føroya Sparikassi erpað sær av stórum yvirskotum, men alt bendir á, at nú er vend komin í.

Báðir stovnar hava fyrr í ár sett pening av ímóti fíggjarligum tapi. Tað er serliga kreppan í alivinnuni, ið rakar Føroya Banka og Føroya Sparikassa meint. Báðir stovnar fíggja meginpartin av alivirkseminum í Føroyum, og lágir prísirnir á heimsmarknaðinum og ILA hava gjørt sítt til, at útlitini ikki eru eins bjørt hjá stovnum, sum tey hava verið.

Teir báðir minnu bankarnir í Føroyum, Norðoya- og Suðuroyar Sparikassi, eru ikki í alivinnuni, og hetta sæst aftur á úrslitunum. Báðir bankarnir fara eftir øllum at døma at hava yvirskot við árslok í ár.

### Minkandi inntøkur

Búskaparvøksturin farnu árini hevur við til at geva inntøkur í landskassan. Vøksturin í inntøkum í 2000 og 2001 var á góð 10%, men henda gongd er nú steðgað. Høvuðsorsøkin til minkandi inntøkurnar er lækkandi skattainntøkur, og eftir øllum at døma heldur henda gongd á.

Framtíðarútlitini á inntøkusíðuni eru nógv tengd av, hvussu stórt virksemi verður í landinum. Blokkstuðulin úr Danmark er í løtuni fastfrystur, og fer samgongan at yvirtaka fleiri málsøki, er vandi fyri, at inntøkurnar minka enn meir.

Landsbankin ger greitt, at ætlar samgongan framvegis at halda kósina ímóti einum sjálvberandi føroyskum búskapi er neyðugt við øðrum inntøkukeldum afturat teimum, vit hava í dag.

### Fíggjarpolitikkurin

Almennu Føroyar hava seinnu árini gjørt stórar og umfatandi íløgur í infrastruktur, sosiala- og heilsuøki og ikki minst í fyrisitingina. Samgongan hevur sett sær sum mál at lækka útreiðslurnar hjá tí almenna við einum prosenti komandi ár. Sum part av at avrigga skuldina til danir, ætlar tað almenna at selja almennar fyritøkunum fyri minka um almennu skuldina, og hjálpa einum føroyskum virðisbrævamarkaði á veg.



*Niðurgongdin í føroyska búskapinum rakar eisini bankarnar. Bæði Føroya Banki og Føroya Sparikassi hava longu sett pening av ímóti tapi*

*Mynd: Savnsmynd*

## Feskfiskurin leggur minni eftir sær

**Samlaða íkastið til føroyska búskapin frá feskfiskaflotanum og fiskavirkjunum fer eftir øllum at døma at minka í ár sammett við í fjør.**

VINNUHÚSIÐ
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Í Vinnuhúsinnum vænta tey, at føroyski feskfiskurin fer at geva væl minni av sær, sammett við í fjør. Samlaða veiðan hjá feskfiskaflotanum í 2002 var 137.000 tons. Miðalprísurin til skipini, ella framleiðsluvirði hjá skipunum, var 9,75 kr/kg og samlaða virði 1.336 mió kr.

Til virkingar í Føroyum fóru 88.000 tons sum í miðal vóru bruttovirðisøkt 5,25 kr/kg rávøru ella til eitt samla virði uppá 462 mió kr. Samlaða miðal framleiðsluvirði í Føroyum fyri hendan fiskin var sostatt 15,00 kr/kg. Av teimum 137.000 veiddu tonsunum vóru 49.000 tons útflutt sum heilur óvirkaður fiskur.

Samlaða íkastið frá feskfiskaflotanum og fiskavirkjunum í 2002 til føroyska búskapin vóru sostatt 1,8 milliard krónur. Eftir hagtølunum at døma verður samlaða íkastið til landshúsarhaldið við árslok 2003 hjá hesum parti av partinum av fiskivinnuni 1,5 milliard krónur, sum 300 mio. krónur minni enn í fjør.

### Virðisøkja í Føroyum

Á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum stendur, at í grundini er bert tveir vakstrarmøguleikar hjá føroysku fiskivinnuni. Ein er at fiska fleiri tons um ári, og hin er at hækka framleiðsluvirðið av veiðuni.

Vinnuhúsið mælir til, at vit royna at fáa meira úr teimum nøgdum, ið í dag fara óvirkaðar av landinum.

Skal meir liggja eftir í Føroyum er neyðugt við hóskandi skipanum, sum veiðulið, virkislið, myndugleikar og løntakarafeløg finna semju, sigur Vinnuhúsið.